## Minningargudstænasta í kvøld

Ársins jóansøku byrjar í roynd og veru í kvøld kl. 20 við eini minningargudstænastu í Vágs kirkju, við luttøku av Jógvan Fríðriksson, bispi. Minningargudstænastan er í samband við, at tað eru liðin 65 ár síðani at Seinni Heimsbardagi endaði. Undir gudstænastuni er ætlanin at minnast teir vágbingar, sum fórust av krígsávum. Í Vágs kirkju verða settar upp modellir av øllum skipunum úr Vági, sum fórust undir krígnum. Tað er Poul Niclasen, vanliga nevndur Malle Poul sum hevur gjørt modellini.

## Aftur á slóðina

Á jóansøku fáa tey, sum hava áhuga í Vágs bygd og viðurskiftunum undir Seinna Heimsbardaga eitt gott høvi at fríska upp gomul minni. Bæði í Sjósavninum á Seglloftinum í Stóra Pakkhúsi og í Gamla Skúla eru framsýningar um hetta evnið. Á fyrra staðnum verða myndir, lutir og annað at síggja. Og á seinna staðnum verða model av øllum skipunum úr Vági, sum fórust undir krígnum. Poul Niclasen (Malle Poul) hevur gjørt modellini.

## Útisetar vitja

Jóansøkan bjóðar eisini uppá sang og tónleik við føroyskum útisetum. Fyrra førið er, tá stevnan verður sett leygardagin kl. 14 av Eydis Kjærbo, forkvinnu í Mentanarnevndini hjá Vágs Býráð heldur røðu. Manskór úr Suðuroynni undir leiðslu av Jens Knudsen og eitt danskt kór, Cartilago frá Frederiksberg Hospital syngja, undir leiðslu av Lise Ellevang. Í hesum kóri eru tveir føroyingar við, Anna Guttesen og Vivian Sundstein. Í seinna førinum fer vágbingurin, Jóanes Nolsøe at framføra orgultónleik í kirkjuni fríggjakvøldið kl. 20.

*Tekstur: Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

# Gleða seg til stevnuna

**Nú nærkast av álvara til ársins triðju stevnu - jóansøkuna í Vági. Henda stevna hevur nógv ár á baki, og spurningurin er enn einaferð, um hon hevur sama áhuga millum vágbingar í dag sum áður. Tann spurningin settu vit okkum at kanna. Inni í handilsmiðstøðini »Torgið« í Vági hittu vit nøkur av starvsfólkunum og viðskiftafólkum teirra. Spurningurin til teirra var hesin:**

***Gleðir tú teg til jóansøkuna í ár?***



*– Ja, tí at hon í ár er í Vági. Eg gleði meg nógv til kappróðurin, tí tað nú gongur so væl hjá Royndini Fríðu og Smyrli úr Vági. At sumbingar eru við báðum bátunum, ger ikki áhugan minni.*

Poul Erik Jacobsen, Sumba



*– Ja, tað er altíð stuttligt og spennandi á jóansøku. Eg gleði meg til hoppiborgina og annað slíkt.*

Kasandra Joensen, Vágur



*– Ja, eg eri øgiliga spent, tí eg skal sjálv rógva kapp.*

Sára Strøm Debes, Vágur



*– Eg eri øgiliga spent til kappróðurin. Eg eri sjálv ættað av Tvøroyri, men búgvi í Vági. Tí fegnist eg um at bátarnir av Tvøroyri og úr Vági hava klárað seg so væl.*

Sigrid Kærbech, Vágur



*– Ja, eg gleði meg til kappróðurin.*

Meinhard Edmund Vestureið, Vágur



*– Eg gleði meg serliga til stevnudystin ímóti B71. Hetta er seinasti dystur okkara áðrenn summarsteðgin, og her mugu vit bara hava trý stig.*

Henning Joensen, Vágur